Álit

í

løgtingsmáli nr. 30/2025: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. (Heitið á løgtingslógini verður broytt, løgtingslógin fær stytt heiti, ein tøknilig broyting, og reglur um endurgjald til smærri vinnurekandi fyri lønarútreiðslur til starvsmenn, sum hava verið óarbeiðsførir vegna sjúku longur enn 4 vikur)

Eirikur í Jákupsstovu, landsstýrismaður í almanna- og mentamálum, hevur lagt málið fram 4. november 2025, og eftir 1. viðgerð tann 6. november 2025 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 11. og 20. november 2025.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Vinnuhúsið og landsstýrismannin í almanna- og mentamálum, Eirik í Jákupsstovu.

Sambært løgtingslóg um dagpening vegna sjúku kann persónur fáa dagpening vegna m.a. óarbeiðsføri vegna sjúku ella skaðatilburð. Dagpeningur vegna sjúku kann tó ikki veitast, um viðkomandi sambært lóg, trygging ella sáttmála frá arbeiðsgevara ella øðrum, hevur rætt til løn undir sjúku v.m.

Løgtingslóg um starvsmenn ásetir, at persónar, sum t.d. arbeiða í handli, hava rætt til løn frá arbeiðsgevara í upp til 120 dagar í sjúkrafráveru. Tað merkir, at viðkomandi ikki hevur rætt til dagpening.

Fyri serliga smærri privatar fyritøkur kann hetta raka sera hart fíggjarliga. Tann vinnurekandi má seta ein avloysara í starvið, sum merkir, at tann vinnurekandi má rinda dupulta løn fyri starvið. Eisini eru dømi um lítlar fyritøkur, har avloysarin eisini gerst sjúkur, og tá má arbeiðsgevarin rinda 3 lønir fyri starvið. Tað kann føra til, at fyritøkan ikki megnar at bera byrðuna.

Undir nevndarviðgerðini er komið fram, at fyritøkur í hesar 120 dagarnar kunnu siga viðkomandi sjúkrameldaða persón úr starvi. Tá er treytin, at grundgevingin er saklig. At fyritøkan ikki fíggjarliga megnar at rinda løn, er at rokna sum saklig grundgeving. Tað merkir, at persónar, sum arbeiða í lítlum fyritøkum, kunnu sigast úr starvi, meðan tey eru sjúkrameldað.

Í politisku skipanini hava spurningar viðvíkjandi smærri fyritøkum og teirra starvsfólki verið nógv viðgjørdir. Fyriliggjandi uppskot kann tryggja smærri fyritøkum betri fíggjarligt haldføri og tryggja teirra starvsfólkum betri fíggjarliga trygging.

Í uppskotinum eru tvær avmarkingar. Ein er, at fyri at koma undir lógina, skal fyritøkan hava útgoldið í mesta lagi 4 mió kr. í lønarútgjaldingum seinasta árið. Hin er, at fyrstu 4 vikurnar skal arbeiðsgevarin framhaldandi rinda sjálvur. Tann tíðin, sum fer út um 4 vikur, kann arbeiðsgevarin fáa endurrindað lønina, tó í mesta lagi 80% av eina arbeiðaraløn.

Fyriliggjandi uppskot er ein varin byrjan at bøta um nevndu avbjóðingar. Arbeiðsgevari við starvsfólki, sum koma undir løgtingslóg um starvsmenn, verður ikki javnstillaður við aðrar arbeiðsgevarar. Tó er uppskotið ein munandi bati í mun til verandi lóg.

Landsstýrið vísir í sínum viðmerkingum á, at mest sum ómøguligt er at meta um kostnaðin av uppskotinum. Við tí í huga tekur Trivnaðarnevndin undir við uppskotinum og vónar, at landstýrið, tá ein tíð er fráliðin, kann eftirmeta nýggju lógina og koma við møguligum broytingum.

Undir viðgerðini er komið fram, at í Føroyum vóru tað í 2024 1072 fyritøkur, sum rinda lønir, sum samlað eru undir 1 million kr. Sama ár vóru tað 466 fyritøkur, sum rindaðu lønir millum 1 og 4 milliónir kr. Út frá hesum eru tað 1538 fyritøkur, sum kunnu koma undir lógina.

Í 2024 vóru tað 333 fyritøkur, sum rindaðu meira enn 4 mió kr. í lønum. Hesar koma sostatt ikki undir lógina.

At seta eitt mark fer altíð at raka óheppið. Trivnaðarnevndin heldur tó, at rætt er at byrja varisliga við eini seinni eftirmeting.

Í dagpeningalógini er álagt arbeiðsgevara at rinda fyrstu 5 sjúkradagarnar, og síðani tekur dagpeningalógin yvir. Við hesi lóg skulu arbeiðsgevarar, sum koma undir hesa lóg, rinda fyri 4 vikur. Eftir tær 4 vikurnar fær arbeiðsgevarin í flestu førum ikki endurgoldið alla lønina.

Talan er sostatt um ein bata fyri nógvar smærri fyritøkur, men ikki eina javnseting. Tá ómøguligt er at meta um kostnaðin av lógini, tekur Trivnaðarnevndin undir við hesi varisligu byrjan.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd Trivnaðarnevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 2. desember 2025

Jørgen Niclasen formaður	Liljan Weihe næstforkvinna	Jaspur Langgaard
Johan Dahl	Árni Skaale	Hans Jacob Thomsen
	Súsanna Bertholdsen	